EG MEINI TAÐ

Eingin hevur nakrantíð angrað eina brúgv

Elin Heinesen skrivar:

ella ein tunnil. Yvirskriftin er ein leysliga umsett yvirskrift á einari grein, eg einaferð las í Berlingaranum: Man har aldrig fortrudt en bro æt hon - eitt sitat eftir danska yrkjaran Benny Andersen. Og hetta kom mær fyri, nú tunnilin undir Vestmannasundi er latin upp. Tí tað er jú rætt!

Flestu atfinningarnar koma altíð, áðrenn eitt nýtt samband letur upp, men tá tað so ER har, kann eingin ímynda sær, at tað IKKI skuldi verið har. Tað er eitt, tvey, trý, so hevur ein vant seg við tað. Púra líkamikið, hvussu nógv mótmæli annars vóru, áðrenn sambandið kom, og hvussu dýrt tað so enn hevur verið at bygt.

Her hugsi eg t.d. eisini um tvær stórar brýr niðri í Danmark Stórabeltsbrúnna og Oyrasundsbrúnna. Har var ein øgiligur levind og gangur ímóti hesum brúgvum áðrenn, tær komu, og hetta varð eisini skýrt at vera nøkur verri fantasifostur, sum tað var púra burturvið bara at droyma um at fara undir. Bara kostnaðurin! Nógv fólk óttaðust eisini fyri, at tey ikki fóru at tora at koyra í undirsjóvartunnlunum, sum eru ein partur av sambandinum bæði yvirum Stórabelt og Oyrasund.

Men nú sambandið er komið og brúgvarnar standa, eru lovorðini mong, hóast fólk ilskast - eisini har inn á okurprísirnar, ein skal gjalda fyri at koyra á hesum brúgvum. Men at tær ERU har, hevur eingin nakað ímóti longur. Áðrenn vóru tær ein náttúruspilla. Nú eru tær eitt satt arkitektoniskt prýði og stoltleikin hjá danska (og svenska) fólkinum. Ja, tað hevur enntá víst seg, at náttúran hevur fingið sínar fyrimunir eisini, við at fugla-, fiska- og djóralív eru økt í økjunum við brúgvarnar. Og fólk vandu seg eisini rættiliga skjótt við tankan um at koyra undir sjónum, tá tey høvdu roynt tað nakrar ferðir og upplivdu tað rímiliga vandaleyst.

Tey flentu at táverandi danska ferðslumálaráðharranum Kaj Ikast - ein av upphavsmonnunum til uppskotið um at byggja Stórabeltsbrúnna - tá hann, spurdur av einum journalisti um hvør fyrimunurin var við Stórabeltsbrúnni (- hetta var áðrenn hon varð liðug), stóð fastur og hansara einasta argument eftir ein langan steðg, har hann hugsaði seg gjølla um, var, at nú fóru bóndirnir á Fjóni at kunna koyra skjótari yvirum Stórabelt við mjólk, so hon kundi keypast frískari í Keypmannahavn! Og rætt er, at tað er ein dýrur fyrimunur at keypa sær, um tað var einasti fyrimunurin.

Men fyrimunirnir við einum góðum, skjótum sambandi millum landspartar eru ikki so eyðsæddir, fyrr enn fólk hava roynt tað. Tað snýr seg ikki bara um pengar og spardar minuttir av ferðini. Nei, tað er sum um bøtta samanknýtingin av landsþortum ikki bara er geografisk ella fysisk, men avgjørt eisini mental. Tað gevur frælsi við føstum sambandi, og tað opnar fyri nýggjum slúsum og niðurbrýtur mentalar forðingar. Ferðslan økist munandi og nógv onnur bond enn bara brúgvin (ella tunnilin) í sær sjálvum verða knýtt. Har sum lív, fólk og ferðsla eru, koma meira lív, fólk og ferðsla aftrat. Sjálvt Vestmenningar fara ivaleyst í longdini at virðismeta, at eisini tey kunnu koyra til og úr Vágum um náttina, um tað skal vera, hóast teir skulu koyra ein ávísan umveg nú.

Jú, man kann vera nostalgiskur yvir at missa eitt vælkent ferjusamband, tí sjálvandi er tað syrgiligt, at eitt langt tíðarskeið er av við hesum ferjusambandi og við teim fólkum, sum høvdu hetta sum arbeiði. Lívið hjá Vestmenningum og Vágafólki og hjá øllum okkum, sum eisini ferðast tann vegin verður ongantíð tað sama aftur. Og vit fara at leingjast eftir løtunum umborð á Ternuni, eins og vit longdust eftir Sam ella Bragd, tá teir sigldu rutuna Vestmanna/Oyrargjógv ella eftir Ólavi, sum sigldi rutuna Kvívík/Fútaklettur í sínari tíð, men eingin kundi droymt um, tá hesi før vóru útskift, at vent aftur til tey gomlu, ikki tá ein fyrst merkti fyrimunirnar við tí nýggja sambandinum.

Og soleiðis man eisini fara at vera við okkara nýggja undirsjóvartunnili. Tað er alt ein spurningur um eina vanasak.

P.S. Hvat við at lata næsta byggistig vera eitt steðgipláss við einum hugnaligum matstað (einari krógv) tætt við annan av tunnilsmunnunum, har ferðandi kunnu steðga og fáa sær ein kaffimunn ella ein bita á vegnum. Kanska endurskapa eitt sindur av tí mistu hugnaløtuni umborð á Ternuni ella við ferjuleguna í Vestmanna fyri tey, sum skulu til ella frá arbeiði... Vit hava í heila tikið alt, alt ov fá matstøð við landsvegirnar í Føroyum! Og í teimum sera fáu sum eru, er hugni í flestum førum ikki júst tað, mær fyrst kemur til hugs - fyri ikki at tosa um matin... ei undur í, tey fægstu tíma at stytta sær stundir har. Nei, har skal meira til at draga fólk sum t.d. sameiningin av vøkrum umhvørvi, góðum útsýni, dygdargóðum mati og vinarligari borðreiðing. Eitt slíkt matstað við tunnilsmunnan kundi eisini í sjálvum sær blivið mál fyri útferðir hjá mongum og hevði uttan iva økt fitt um ferðsluna gjøgnum tunnilin!

Sum í spegli, sum í gátu

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út bókina Sum í spegli, sum í gátu eftir Jostein Gaarder. Laura Joensen týddi úr norskum.

ÚTGÁVA

Sum í spegli, sum í gátu er ein heit, vøkur og opinskárað søga um at liva og doyggja.

Søgan er um Silju, sum er álvarsliga sjúk og verður ikki frísk. Jólini eru fyri, men hon orkar ikki at vera uppi. Hon skrivar tankar sínar í kinesisku dagbókina, sum hon hevur fingið frá einum lækna á sjúkrahúsinum. So við og við sær hon, at tá ið mamman, pápin og hini ikki eru til staðar, er ein eingil hjá henni. Eingilin Ariel og Silja byrja at tosa saman. Silja roynir at fáa Ariel at avdúka himmalskar loynidómar, og Ariel greiðir henni frá um lívsins gátur, og um, hvussu heimurin er settur saman. Og Silja lærir hann, hvussu tað er at vera menniskja. Samrøðurnar teirra millum flyta



Silju burtur frá sjúkrasongini og lyfta lesaran inn í eina søgu, sum til tíðir er døpur, men ongantíð vónleys. Eitt ævintýr um deyðan verður til ein dreym um ódeyðligleika, og fær lesaran at fegnast og fróast um lívið her og nú.

Sum høvundur hevur Jostein Gaarder, sum er føddur í 1952, gingið nýggjar leiðir, og stóra styrkin í bókum hansara er eitt nú, at hann megnar at seta viðkvæmar og truplar spurningar á ein hátt, sum børn fata. Í 1996 gav Bókadeild Føroya Lærarafelags út Jólagátan og í 1999 Kabálgátan eftir Jostein Gaarder. Skaldsøgan, sum gjørdist gjøgnumbrotið hjá Gaarder, Sofies Verden, verður eisini týdd til føroyskt. Hendan bókin hevur ligið ovast á metsølulistum í nógvum londum, er týdd til 44 mál og er seld í meiri enn 16 milliónum eintøkum. Í 1995 var hon mest selda skaldsøgan í heiminum.

Fyri bókina Sum í spegli, sum í gátu fekk Jostein Gaarder í 1993 Bókhandlaravirðislønina, og í fleiri norðurlondum er bókin ógvuliga væl móttikin. Beint sum hon var útkomin í Týsklandi í 1996, endaði bókin á metsølulista. Bókin er eisini komin út í øðrum londum. Sum í spegli, sum í gátu verður í løtuni gjørd til film.

Sum í spegli, sum í gátu er 158 bls. og kostar kr. 140 í bókabúðunum.

Jólasøga og Flekk

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út myndabókina Ein jólasøga og smábarnabókina Flekk fer á skattaveiðu

ÚTGÁVA

Flekk fer á skattaveiðu er smábarnabók, væl egnað til tey heilt smáu. Eric Hill hevur skrivað og Eyðna Magnussen hevur týtt.

Pápi Flekk finnur upp á eitt nýtt og stuttligt spæl. Hygg undir klaffarnar í bókini og hjálp Flekki og vinum hansara at leita eftir krógvaðum lutum og at loysa gáturnar. - Kanska gerst tú eisini bilsin at enda.

Flekk fer á skattaveiði kostar kr. 85 í bókabúðunum.

Ein jólasøga er myndabók, sum er vælegnað til tey 3-4 ára gomlu. Heather Amery og Stephen Cartwright hava skrivað og teknað. Anna Maria Reinert Jensen týddi úr enskum.

Í bókini eru fýra putlispøl. Putlispølini eru myndir til fittu søguna um Elisabet og Edvard, sum halda jól.

Ein jólasøga kostar kr. 80 í bókabúðunum.

Spennandi dagar í Vietnamm

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út barnabókina Dýrgripur Tu Ducs eftir Bjørn Sortland

ÚTGÁVA

Dýrgripur Tu Ducs er tann fyrsta av bókunum um Juliu og Jónas. Bjørn Sortland hevur skrivað og Mortan Weyhe týddi úr norskum. Bókin er ætlað teimum 8-12 ára gomlu.

Tey bæði Julia og Jónas fara saman við foreldrum sínum til Vietnamm. Pápi Jónas er tíðindamaður og mamma Juliu er myndakvinna. Meðan tey royna at avgreiða uppgávuna, tey hava í Vietnamm, fara Julia og Jónas á kanningarferð, sum verður ikki sørt vandamikil. Tað verður ein ferð, tey ikki gloyma í bræði.

Dýrgripur Tu Ducs er 123 bls. og kostar kr. 125 í bókabúðunum.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Organistur av hjarta

Hjørleif Waag Høgnesen hevur verið organistur í Christianskirkjuni í 30 ár. Eitt starv, sum hann nærum hevur røkt einsamallur øll árini. Hóast tað, fer hann framvegis hugaligur avstað hvørja ferð onkur handling er í kirkjuni. Hann heldur ikki, at tey ungu taka við eftir teimum eldru, tá tað kemur til at ganga í kirkju

Hjørleif Waag Høgnesen við urguna í Christianskirkjuni. Hann hevur røkt starvið sum organistur í 30 ár

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen

Innan úr stovuni streyma tónar út í gongina. Tað er onki at ivast í, hvat tað eru fyri tónar. Tað er sálmasangur úr Christianskirkjuni. Sálmurin Ver vælkomið Harrans ár og bæði urga og hornblásarar hoyrast saman við serstaka klanginum, sum sálmasangurin í Christianskirkjuni sigst at hava. Inni í stovuni situr Hjørleif og lurtar. Hann býður góðan dag, og vit sessast í sofuni.

Prátið byrjar spakuliga um hetta at hava verið organistur í so mong ár. Hjørleif sigur, at honum framvegis dámar líka væl. Hann hevur ongantíð hugsað, at hann ikki tímir meira. Spurdur um tað ikki er bundisligt, sigur hann, at hann eitt nú ongantíð hevur havt ein longsul eftir at sleppa at ferðast, so tí heldur hann, at organistur hevur riggað væl til sín.

- Eg fari altíð hugagóður og væl fyrireikaður avstað, sigur hann.

Hjørleif sigur, at tað er ongin loyna, at tað ganga færri og færri fólk í kirkju, og tað harmast hann um. Hann hevur altíð verið so trúfastur móti kirkjuni og góður við hana eisini. Tað vita øll, sum kenna Hjørleif – enntá tey, sum bara kenna hann av navni. Í Christianskirkjuni hevur tað verið ein óskrivað regla um føst pláss, og Hjørleif man vita, hvar tey flestu eiga at sita, sum javnan eru í kirkju. Tí sær hann eisini lættliga, at tað tynnist við fólki, sum tíðin liður.

- Tá eg hyggi niður í kirkjuna, síggi eg, at nógv av teimum gomlu og trúfastu eru burtur, og tey ungu taka ikki við. Eg veit ikki at siga, um tað er soleiðis allastaðni, men tað sigst, sigur hann harmur á málinum. Hann leggur afturat, at tann presturin, sum hevur savnað flest fólk, meðan hann hevur verið organistur, var Paulsen, sum var prestur í Klaksvík eitt stutt tíðarskeið eftir, at Bøgesvang var farin.

Tónarnir úr Christianskirkjuni streyma framvegis út úr hátalarunum. Og tað gevur ein ávísan hugna soleiðis at sita og práta, meðan sálmasangur hoyrist í bakgrundini.

- Hatta er frá kirkjugongdini fyrsta sunnudag í advent, sigur hann.

Og tað var nevniliga tann sunnudagin, at Hjørleif varð heiðraður av kirkjuráðnum og kirkjugangarum fyri trúfasta tænastu í 30 ár sum organistur í kirkjuni. Sera mong fólk vóru til staðar í kirkjukjallaranum eftir guðstænastuna, tá Hjørleif varð heiðraður.

- Ja, har var ein rúgva á fólki, øll fingu ikki sitið, sigur Hjørleif, sum var púra ovfarin av, at so mong komu. Men hann er eisini rørdur, og so vísir hann gávuna, sum hann fekk frá kirkjuráðnum. Eitt lítið orgul gjørt úr kopari. Orgul pípurnar hava perur í endunum, so tað er eitt slag av jólaprýði. Sera vakurt á at líta.

Spurdur, um honum dámar væl at lurta eftir upptøkum úr Christianskirkjuni, svarar Hjørleif smílandi:

» Spyr sonin!« Og so flennir hann og leggur aftur at, at hann eigur fleiri hundrað upptøkur úr Christianskirkjuni. Á gólvinum stendur ein kassi við nógvum smáum kuffertum í. Í hvørjum kufferti eru einar 10 ella 15 fløgur við upptøkum. Hjørleif sigur, at hann eigur upptøkur frá teimum seinastu tíggju árunum á fløgu.

Umfatandi starv

Hjørleif hevur røkt starvið sum organistur í Christianskirkjuni nærum einsamallur øll tríati árini, hann hevur verið har. Hann byrjaði sum avloysari fyri Fridu Petersen, sum var undan honum. Í 1972 byrjaði bleiv hann so fastur organistur, og har hevur hann sitið mest sum til hvørja kirkjuhandling síðani. Tað verður mett at vera um 200 handlingar um árið, so tað er blivið til nakrar vígslur, gudstænastur og konfirmatióntir gjøgnum árini. Umframt allar aðrar handlingar sjálvandi.

Hann sigur, at tað hava verið nógvar serligar løtur í kirkjuni, men um hann skal taka nakra fram um aðra, so nevnir hann norðurlendsku gudstænastuna, sum bleiv tikin upp í sjónvarpinum í 1993 og send í øllum Norðanlondunum. Hann greiðir frá, at árið eftir fór Klaksvíkar Hornorkestur, sum eisini luttók á tí konsertini, til Onglands, og nakrir av spælarunum søgdu, at har var ein svensk kvinna, sum hevði kent onkran av teimum aftur frá tí norðurlendsku konsertini.

Hjørleif byrjaði at spæla sum 13 ára gamal upp á urguna í samkomuhúsinum Emmaus í Klaksvík, men tað var ikki á eina pípuurgu, tað var ein traðkiurga. Hann byrjaði ikki at spæla upp á pípuurgu, fyrr enn hann var um 50 ára aldur. Hóast tað, so siga fólk, sum minnast, tá hann byrjaði, at tað var ótrúligt, hvussu skjótt hann kom eftir tí. Tí tað er stórur munur á at spæla á teimum báðum.

- Tað, sum var torførast at venja seg við, var at spæla við beinunum eisini, sigur Hjørleif, men tað gekk ikki long tíð, so hevði hann vant seg við tað. Men sum við øllum øðrum, so krevur urguspæl eisini venjing.

- Fólk skilja tað ikki altíð, so eg plagi at samanbera tað við fótbólt. Um ein ikki venur, so gongur tað bara tann skeiva vegin. Og tá síggja tey, at tað er tað sama við urguni, sigur hann smílandi.

Hjørleif hugsar ikki um at gevast at spæla upp á urguna enn, hóast hann er komin væl upp í árini.

- Um ein hugsar um mína heilsu, so er ongin orsøk at gevast enn, men eg veit ikki, nú taki eg bara eitt ár at gangin, so fáa vit at síggja, sigur hann at enda.

Úr hátalarunum hoyrist deknurin biðja útgangsbøn og síðani biðisløgini. Samrøðan er av, og uttanfyri bíðar tann lýggja vetrarluftin við regni og vindi.